# Eg spæli á heima-vølli

**Jákup Mikkelsen sigur greitt, at hann spælir steypafinalu á sínum heimavølli fríggjadagin. Tað verður helst hansara seinasta finala sum fótbóltsmálverji, og tí vil hann fegin vinna gull á vøllinum, har alt byrjaði. Á vøllinum í Klaksvík**

Uni Holm Johannesen

Pallurin verður hin sami sum fleiri ferðir áður. Hann er vaksin upp í hesum umhvørvinum, sum var hansara annað barndómsheim. Alt er soleiðis, sum tað hevur verið. Einki er øðrvísi. Og tó.

Klaksvíkingurin Jákup Mikkelsen skal fríggjadagin verja málið hjá fuglfirðingum á grundvøllinum, sum hevur lagt lunnar undir hansara yrkisleið. Uppgávan verður ikki at stríðast við klaksvíkingar, men at vinna steypafinaluna móti EB/Streymi á fótbóltsvøllinum í Klaksvík.

Hann hevur ongar trupulleikar við at umboða fuglfirðingar í steypafinaluni í heimbýnum.

– Tað er ein serstøk kensla, at eg fyrireiki meg til steypafinaluna, sum skal avgreiðast á mínum heimavølli. Eg gleði meg sjálvsagt til avbjóðingina, sigur fyrrverandi landsliðsmálverjin.

Hann metir ikki, at tað verður ein fyrimunur fyri hann at spæla í Klaksvík.

## Klaksvík er væl egnað

Ætlanin var upprunaliga, at steypafinalan skuldi spælast á ovari vølli í Gundadali. Tórshavnar kommuna og Fótbóltssambandið samráddust í nakrar vikur, men tað eydnaðist ikki at finna eina semju.

Klaksvíkar Kommuna vendi sær fyrr í ár til FSF við tilboði um, at klaksvíkingar eru til reiðar at hýsa dystinum. Fyri gott og væl tveimum mánaðum síðan varð avgerðin tikin, at finalan um Løgmanssteypið skal spælast í Klaksvík.

Jákup Mikkelsen er býráðslimur í Klaksvík. Hann er ikki við í fyrireikingunum til dystin, men málverjin vísir hinvegin á, at finalan loksins verður spæld aðrastaðni enn í høvuðsstaðnum.

– Umstøðurnar í Klaksvík eru framúr. Tað ítróttarliga skal raðfestast hægst. Tað er ikki rætt, at finalan verður altíð spæld í Havn, hóast høvuðsstaðarfeløgini eru í finaluni. Klaksvíkingar fáa seg nú royndar, og eg eri vísur í, at tað fer at rigga væl. Tað er ein greiður fyrimunur. Klaksvík verður við hesum ein annar upplagdur møguleiki, sigur Jákup Mikkelsen.

Hann leggur afturat, at undirlagið á vøllinum er ikki nøktandi. Tað er gamalt og slitið. Ætlanin er at skifta graslíkið í komandi ári, sambært býráðsliminum.

## Seinasta steypafinalan

Jákup Mikkelsen verður 40 ára gamal hin 14. august í ár. Hann gavst sum landsliðsleikari í fjør, men klaksvíkingurin hevur valt at halda fram á hægsta stigi í Føroyum. Hann var ikki sinnaður at spæla í næstbestudeildini, og tí skifti hann úr KÍ til ÍF undan kappingarbyrjan í ár.

Fyrrverandi landsliðsmálverjin hevur vunnið tríggjar steypafinalur í føroyskum fótbólti. Í 1990 og 1994 við barndómsfelagnum KÍ, og í 2006 við B36.

Jákup Mikkelsen verður ikki fótbóltsmálverji í fleiri ár afturat. Tí er møguligt, at steypafinalan í Klaksvík verður hansara seinasta sum málverji.

– Eg vænti ikki, at eg fari at spæla fleiri steypafinalur. Tí vóni eg, at eg kann vinna mína seinastu steypafinalu, har alt byrjaði. Á vøllinum í Klaksvík, sigur hann.

*uni@sosialurin.fo*




**FINALAN**

*– Tað er ein serstøk kensla, at eg fyrireiki meg til steypafinaluna, sum skal avgreiðast á mínum heimavølli.*

## Vøllurin skal skiftast

**– Um finalan skal avgreiðast í Klaksvík aftur komandi ár, so vóni eg, at graslíkið verður skift, sigur Eyðun Thorgeirsson, formaður í fjepparafelagnum Bláa Bylgjan**

Eyðun Thorgeirsson og onnur fótbóltsáhugaði í Klaksvík gleða seg til finaluna um Løgmanssteypið.

Eyðun er formaður í Bláu Bylgjuni, sum er fjepparafelagið hjá KÍ. Hann er fastur fúsur til dystirnar hjá klaksvíkingum.

Men skal finalan avgreiðast í Djúpumýru í framtíðini, skal verandi graslíkið á vøllinum skiftast út. Tað er ikki tíðarhóskandi, sambært honum.

– Men tað er hóskandi, at finalan er í Klaksvík. Eg havi varhugan av, at leikarar, venjarar og viðhaldsfólk elska at verða til dystir her. Tað er hóskandi at spæla á Summarfestivalinum, tí ein rúgva av fólki eru saman júst tá. Klaksvíkingar hava eisini stóran áhuga í fótbólti, og tí bendir nógv á, at tað verður ein mælsk viðhaldsfjøld til dystin, sigur Eyðun Thorgeirsson.

Tríggir klaksvíkingar skulu spæla finalu í Klaksvík. Jákup Mikkelsen og Rógvi Jacobsen umboða ÍF, og Kristoffur Jakobsen er knýttur at hópinum hjá EB/Streymi.

Klaksvíkingar ætla sær ikki at stuðla einstøkum leikarum fríggjakvøldið.

– Tað er einki nýtt, at klaksvíkingar spæla við øðrum liðum. Vit hugsa ikki stórvegis um tað. Eg ætli mær ikki at stuðla ávísum liðum ella spælarum, sigur Eyðun Thorgeirsson.

Hann leggur afturat, at Bláa Bylgjan fer helst at gera okkurt burturúr dystinum.